LM-099/2023

Fylgiskjal 68

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagfest 19. februar 2024

Stjórnarskrivstovan

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 TÓRSHAVN

Okkara j.nr.
24/00587-3

Málsviðger

Tygara j.nr.

Viðvíkjandi uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Generell viðmerking:

Tað er gott, at eitt uppskot um at skipa ferðavinnuna nú fyriliggur, eisini at lagt er upp til eitt gjald við komu til Føroya.

Tó er tað lítið sannlíkt, at allar kommunur í Føroyum megna at gera eina fullfíggjaða ferðavinnuætlan til komandi ár. Har manglar bæði fígging, starvsfólkaorka og servitan til at megna tað, hetta fevnir eisini um Tórshavnar kommunu. At skipa ferðavinnuna á tann hátt, sum hetta uppskotið leggur upp til, er sera arbeiðskrevjandi fyri kommununa, og metast kann ikki við, at tað arbeiðið kann fíggjast við náttúrugjaldinum fyrsta árið.

Fleiri møguligar loysnir eru til hetta, Eitt uppskot er, at landið fíggjar einum ella fleiri ráðgevum við tí endamáli at stuðla arbeiðinum hjá kommunum og onkur "skabelón" er at arbeiða út frá.

Viðv. §1: Stuðla sjálvandi endamálinum um burðardygga ferðavinnu.

Viðv. §: 4 stk. 4: Sjónveik mugu hava hund við sær.

Viðv. §5: Yvirskipað gott, at ein standardavtalu verður gjørd av landstýrismanninum, um hon er hóskandi fyri øll økir í FO.

Viðv. §6: "Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark" : Í Tórshavnar kommunu er bygdagøta úr Norðradali til Skælings og úr Kollafirði til Leynar. Spurningur er, hvussu hetta skal fungera í praktiskt, um kommunuætlanirnar eru ymiskar.

- Ikki verður nevnt, um torleikastig bert er galdandi fyri gongufólk). Hædd má eisini takast fyri t.d. súkklum, sum er vaksandi innan ferðavinnu í Norðurlondum. Eisini má nágreinast, hvørjum stiga fyri torleika, ið man fylgir. T.d. fylgir man hjá VFI einum altjóða stiga við heilt nágreiniligum lýsingum av hvørjum torleikastigi.
- Ógvuliga stórt arbeiði at áleggja hvørja kommunu at gera til komandi ár.
- Bert staðkend kunnu vera ferðaleiðarar. Heldur átti uppskotið at havt eina áseting um, at *"Persónur kann einans verða ferðaleiðari, um viðkomandi hevur hóskandi vitan um*

staðbundnu viðurskiftini". Hetta soleiðis, at viðkomandi persónur eisini hevur vitan um tær avbjóðingar, ið kunnu gera seg galdandi á teimum staðbundnu plássunum.

Viðv. §7: Hvør er heimafólkið nágreiniliga í t.d. Tórshavnar kommunu. Um vit siga bygdirnar, fer so 25% at býta út til allar bygdirnar í kommununi? Og júst í hvønn kassa fer hasin peningurin – ein vandi er, at størsti parturin fer í umsiting við so stórum tali av bygdum, sum eru í kommununi.

Viðv. §8: Tað er kostnaðarmikið bæði at varðveita og gera nýggjar farleiðir í náttúruni og verður tað trupult at fíggja við 50% av samlaða náttúrugjaldinum á 10 mió (kommunuparturin av nýggja gjaldinum). Tórshavnar kommuna hevur seinastu árini gjørt eitt munagott arbeiði at varðveita gomlu bygdagøturnar og eisini at gera nýggjar lendisgøtur samanborið við aðrar kommunur.

Viðv. §11: Áseting um, at landsstýrismaðurin kann steingja hagarnar við kunngerð. Tað er problematiskt, at so víðkaðar heimildir verða givnar einum landsstýrismanni at kunna steingja hagar uttan stórvegis eftirlit.

Viðv. §13: <u>Áseting um 150 krónur ferðaavgjald til hvørt ferðafólk.</u>

Sambært uppskotinum skulu føroyingar ikki gjalda ferðaavgjald. Men hvat er ein føroyingur sambært hesum lógaruppskotinum?

Best hevði verið, at ein føroyingur er ein borgari, sum er fult skattskyldigur í Føroyum. Á henda hátt verður ikki gjørdir mismunir millum borgarar. Eisini verður ikki mismunur gjørdur millum danskar ríkisborgarar og íslendskar ríkisborgarar. Vísast skal til Hoyvíkssáttmálan og Heimastýrislógina.

Hetta tí, at tað er ikki rættvíst, at danskir ríkisborgarar, sum ikki búgva í Føroyum, skulu hava frítt at fara, bara tí tey eru danskir ríkisborgarar, men ikki eru fult skattskyldug í Føroyum. Fólk, sum eru fult skattskyldug í Føroyum, skulu ikki rinda ferðaavgjald.

Harvið verður neyðugt at gera eina serstaka broyting í Løgtingslóg um ferðaavgjald, at persónar, ið eru fult skattskyldugur í Føroyum, ikki skulu rinda ferðaavgjald.

Er hædd tikin fyri tí avleiðing, at um allir cruisegestir (eisini teir, sum ikki fara í land í Føroyum) skuldu gjalda 150,- afturat við komu, er møguleiki fyri, at Føroyar verða valdar frá? Virkandi í føroysku cruisevinnuni hava áður víst á, at Føroyar aloftast bert er eitt stopp á vegnum til Íslands ella Grønlands og ikki ein destinasjón í sær sjálvum og tískil lættari at frávelja.

Tórshavnar kommuna vísir í hesum sambandi eisini til hoyringsskrivið frá Tórshavnar havn saman við øðrum havnum.

Viðv. §14: Sambært hesum fer bert helvtin av náttúrugjaldinum til at skipa gongd í haga. Tørvur á at nágreina stk. 3, hvat tað merkir at "umsita til átøk og trivnað á staðnum" – hetta kann vera alt millum himmal og jørð og neyðugt er at tryggja, at hetta verður brúkt skynsamt. Eisini krevur hetta nógva umsiting. Peningurin kundi møguliga verðið brúktur betur, um kommunan fekk 75% og partur av tí so bleiv býtt út til bygdirnar til trivna? Í Tórshavnar kommunu kundi tað verið bygdadagar og tiltøk á útoyggj v.m..

Viðmerkingar:

Viðv. 2.11: Hetta brotið samsvarar ikki við restina av uppskotinum – hvørki upphædd ella býtið (120,- og tríggir fjórðingar til kommunur og fjórðingur til eigarar.) Feilur

Viðv. s.14, seinasta brotið: Kommunan ger saman við heimafólkið av, hvussu man skipar ferðavinnuna á staðnum m.a. í mun til vesi, dvalarvikar, burturkast v.m. Kann partur av hesum arbeiðið verða goldið av teimum 25%, sum heimafólkið fær av náttúrugjaldinum – ella skal kommunan gjalda? Hetta kundi verðið meira greitt.

Viðmerkingar eftir framløguna í Finsen tann 14. Februar 2024 :

Víst varð á, at tað við hesari lóggávu ber til at avmarka ferðslu inn í nógv vitjaðu bygdirnar. Á hvønn kann hetta gerast, um ongar fysiskar forðingar kunnu setast upp við komu til bygdirnar? Í Tórshavnar Kommunu kundu slíkar avmarkingar blivið aktuellar í Kirkjubø, Koltri og møguliga eisini heilt smáu bygdunum sum t.d. Norðradal og Syðradal.

Vinaliga
k.v.

Heðin Mortensen
borgarstjóri

Jóan Petur Hentze
kommunustjóri